## Frankaríki besta heilsuverk

Health Consumer Powerhouse hevur kannað heilsuverkini í londunum og givið teimum stig út frá ymsum metingarhornum. Frankaríki fekk besta met. Danmark endaði á einum 10. plássi og gjørdist sostatt aftast av norðanlondunum. Her er listin yvir londini. Aftanfyri standa stigini, sum heilsuverkini hava fingið:

| Land: | Stig: |
|---|---|
| 1. Frankaríki | 576 |
| 2. Holland | 572 |
| 3. Týskland | 571 |
| 4. Svøríki | 566 |
| 5. Sveits | 563 |
| 6. Luksemburg | 546 |
| 7. Belgia | 533 |
| 8. Eysturríki | 498 |
| 9. Finnland | 496 |
| 10. Danmark | 473 |
| 11. Italia | 471 |
| 12. Slovenia | 466 |
| 13. Malta | 463 |
| 14. Ungarn | 453 |
| 15. Stóra Bretland | 436 |
| 16. Portugal | 435 |
| 17. Spania | 434 |
| 18. Grikkaland | 434 |
| 19. Kýpros | 422 |
| 20. Estland | 421 |
| 21. Póland | 409 |
| 22. Kekkia | 403 |
| 23. Slovakia | 369 |
| 24. Lettland | 365 |
| 25. Írland | 359 |
| 26. Litava | 340 |

(750 er mest møgulig stig)

*Kelda: www.healthpowerhouse.com*

# Danska heilsuverkið stendur seg illa í frágreiðing

**Health Consumer Powerhouse hevur latið úr hondunum eina frágreiðing og metan av heilsuverkunum í 25 ES-londum. Danmark klárar seg ikki væl á kanningini. Teir liggja á einum 10. plássi á jøvnum føti við tey eysturevropeisku londini. Á summum økjum fær danska heilsuverkið botnmet**

HEILSUVERKIÐ
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*



*„Tað sær út til, at politikarar hava lyndi til at stara seg blindar á heilsuverkið í Danmark", sigur Jákup Petersen, yvirlækni, í lesarabrævi í dag*

Í blaðnum í dag hevur Jákup Petersen eitt lesarabræv, har ið hann vísir á veikleikar við danska heilsuverkinum. Jákup byggir útsøgnirnar á eina frágreiðing frá „Health Consumer Powerhouse" (HCP), sum er ein kanningarstovnur, ið arbeiðir fyri at brúkararnir kunnu fáa óhefta kunning um støðið á teimum ymsu heilsuverkunum.

Á heimasíðuni hjá HCP stendur, at endamálið hjá felagsskapinum er at greina úrslit hjá heilsuskipanum og samanbera tey við onnur. Teir vilja arbeiða fyri at sjúklingurin skal gerast ein sterkur brúkari heldur enn ein veikur sjúklingur. Ein hvør eigur at hava rætt til at velja millum ymisk viðgerðartilboð tvørtur um landamørk. HCP vil upplýsa og kunna, so at brúkarin veit, hvat hann fær.

### Hyggja at øðrum møguleikum

Sum altjóðagerðin ger seg meira og meira galdandi, verða gomul mørk og sambond brotin niður. Nógvir møguleikar opnast fyri tí einstaka, og tann landafrøðiliga og fíggjarliga forðingin verður einans minni og minni.

Jákup Petersen reisir í lesarabrævinum spurningin, um vit ikki áttu at hugt at øðrum londum enn Danmark, tá ið vit senda fólk til viðgerðar uttanlands.

Kanningin hjá HCP setir Danmark á eitt 10. pláss millum 25 ES-lond. Danmark er sostatt niðast av norðanlondunum í kanningini. Heilsuverkini fáa met á fimm ymiskum økjum, og tað er serliga tá ið tað kemur til úrslit av viðgerðum, at Danmark klárar seg illa. Har fáa teir botnmet, og kunnu javnmeta seg við londini frá gamla Sovjetsamveldinum. Eisini í effektiviteti og rationellari stýring fær danska heilsuverkið vánaligt met.

### Politikarar stara seg blindar

Heilsuverkið í Danmark hevur verið hart kritiserað í seinastuni, og spurningurin er, í hvønn mun føroyingar merkja tað.

„Tað sær út til, at politikarar hava lyndi til at stara seg blindar á heilsuverkið í Danmark", sigur Jákup Petersen í lesarabrævinum. Til endans reisir hann spurningin, um tímin er komin at hyggja aðrastaðni at senda sjúklingarnar.

Marjus Dam:

# Heilsuverkið í Danmark søguliga millum tey bestu

**Marjus Dam er ikki samdur við atfinningunum hjá Jákupi Petersen, yvirlækna, at danska heilsuverkinum.**

**– Samstarvið við danska heilsuverkið er orsøkin til, at vit hava nakað heilsuverk í dag. Sjúkrahúsleiðslan hevur møguleika at gera avtalur við onnur sjúkrahús, um viljin er til tess, sigur Marjus Dam**

HEILSUVERKIÐ
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Sosialurin hevur ringt til Marjus Dam, løgtingslim og lækna, og spurt hann um hansara meining í samband við kanningina hjá Health Consumer Powerhouse, har ið Danmark liggur á einum sera eyðmjúkum 10. plássi.

– Nú havi eg ikki lisið frágreiðingina, og tí kann eg ikki ordiliga úttala meg beinleiðis um hana, men endamálið hjá løgtinginum er at játta nóg mikið av peningini, og at peningurin verður nýttur optimalt.

– Tað eru allatíðina nýggir viðgerðahættir, og tað er týdningarmikið, at vit hyggja eftir, so at vit fáa mest burturúr hvørjari krónu, sigur Marjus Dam.

### Søguliga knýtt til Danmark

Marjus heldur ikki, at tað er neyðugt at hyggja aðrastaðni enn til Danmarkar at senda okkara sjúklingar. Heldur skulu vit arbeiða fyri, at danska heilsuverkið mennir seg.

– Føroyar eru søguliga tætt knýtt til Danmark, og tað ger seg eisini galdandi innan heilsuverkið. Tað er eisini neyðugt, at vit knýta okkum at einum heilsuverkið, tí at tað verður sagt, at minst 300.00 brúkarar skulu til, at eitt heilsuverk kann virka við øllum viðgerðartilboðum.

– Eg eri eitt sindur varin at úttala meg um hetta málið, men eg trúgvi, at kanningin fer at geva danskarum høvi at kanna heilsuverkið og at betra tað.

Marjus er ikki samdur í, at danska heilsuverkið er vánaligt.

– Danska heilsuverkið hevur traditionelt verið millum tey frægastu í heiminum. Vit hava góðar royndir við danska heilsuverkinum, og eg dugi ikki at síggja nakra orsøk at slíta við tað, sigur Marjus Dam, sum heldur, at ríkisrættarliga støðan er til fyrimun fyri føroyska heilsuverkið.

### Jákup Petersen ger ein feil

Jákup Petersen, yvirlækni, sigur í lesarabrævi í dag, at politikararnir hava lyndi til at stara seg blindar á danska heilsuverkið, og at teir eiga at hyggja at øðrum møguleikum.

– Har haldi eg, at Jákup Petersen ger ein feil. Um sjúkrahúsverkið og læknarnir ynskja at gera avtalur við onnur sjúkrahús, so hava teir møguleika til tað. Løgtingið játtar pengar til heilsuverkið, og tað er sjúkrahúsleiðslan, sum umsitir pengarnar. Tí hava teir allar møguleikar at gera avtalur aðrastaðni, sigur Marjus Dam at enda.



*- Danska heilsuverkið hevur traditionelt verið millum tey frægastu í heiminum. Vit hava góðar royndir við danska heilsuverkinum, og eg duga ikki at síggja nakra orsøk at slíta við tað, sigur Marjus Dam*

i Sosialurin